# Dyrging eftir makreli.

Tíðarskeið: 10. - 13. sept. 1997

Ábyrgd og skriva frágreiðing: Kristian Zachariassen

Í Egersund fyri FRS: Kristian

**Endamál:** Endamálið við ferðini var at kanna hvussu norðmenn bera seg at við at veiða makrel við langdorg. Nógv hevur verið at hoyrt um hesa veiðu frá monnum, sum hava fiskað í suður Noregi. Avgjørt varð at onkur frá Fiskirannsóknarstovuni skuldi fara til Noregs at fáa upplýsingar til vega um hesa veiðu.

**Eitt sindur um ferðina:** Farið varð úr Føroyum mikudagin tann 10. sept. og komið varð til Noregs um kvøldið sama dag.
Kl. 0900 morgunin eftir var avtalað við "fiskerirettlederen" í Egersund, Jan Erik Jensen, at hann skuldi koma við mær á nøkur flakavirki fyri at fáa uppl. um prís, góðsku o.a. Eisini greiddi hann frá um kvotur og onnur ting í hesum sambandi. Í stuttum kann sigast, at hann hjálpti við at fáa greiðu á øllum uttan sjálvari tilriggingini umborð. Vitjað varð á Egersund Seafood og á Fonn A/S. Hetta eru virki, sum taka ímóti m.a. uppisjóvarfiski.
Restin av degnum tann 11/9. og allur 12/9. varð nýttur til at fáa upplýsingar til vega um útgerð og frammferðarhátt. Ætlanin var møguliga at sleppa við onkrum báti, men hetta lág ikki fyri. Ístaðin varð tíðin nýtt til at tosa við menn og at taka myndir. Hetta var kanska eisini betri, tí so var møguleiki at vitja umborð á fleiri bátum. Eisini varð vitja á Hovland Båt A/S, tað eru teir, sum lata útgerðina til bátarnar.
Farið varð heim aftur tann 13. sept. um morgunin.

**Fiskiskapur:** Fiskiskapurin hjá bátunum er góður, hjá teimum størstu og bestu sera góður. Kvotan er 85 tons pr. bát. Teir fyrstu vórðu liðnir við hana eftir 4 vikum.
Vanliga fiska teir til báturin er fullur. 5 - 10 tons um dagin er vanligt fiskarí, men 15 - 17 tons er ikki óvanligt hjá teimum størru bátunum, sum hava 5 dergur í sjónum ísenn. Leggjast skal tó afturat, at sum við øðrum fiskiskapi, eru vánaligir dagar ímillum.
Makrelur kann vera torførur at fáa at taka, men tá hann byrjar at taka er rokfiskarí. Teir siga at ein dorg fiskar millum 700 og 1000 kg um tíman tá kenn er.

Tá fiskað verður, ræður tað um at fáa makrelin at verða hjá bátinum alla tíðina og eisini at ligga á rættari kós í mun til gongdina á makrelinum.
Sera týdningarmikið er, at báturin ikki heldur ov nógvan gang, siga teir flestu. Aðrir siga, at hetta bert eru undanførslur tá teir einki fáa.

**Útgerð:** Dergur við millum 30 - 60 húkum á hvørjari.
Fultautomatiskar snellur, 1 til hvørja dorg.
Rennur o.a. at fáa fiskin av dorgini og niður í lastina.
Húkar og beitur.
Tann tvørskips avstandurin skal vera minst 2,70m, ella koma dergurnar ov illa í trol.
Um skipanir verða settar frammanfyri hvørja aðra, skal tað fremra loddið á dorgini vera tyngri enn tað aftara. Dømi: fremra 6 kg og tað aftara 4,5 kg.
Um makrelurin stendur á 8 - 12 favnum, verður lorað uml. 20 - 28 fv. út á teim aftaru og uml. 5 fv. minni á teim fremru.
Teir hava ofta 10 - 20 húkar minni á teimum fremru dergrunum. Húkarnir eru vanligir húkar, sum beita verður koyrd á. Beitan skal vera reyð. Teir flestu nýttu slangur, sum elektrikarar nýta at skoyta leidningar saman við. Annars kundu originalar beitur keypast á Nordsø Not A/S

**Prísur á útgerð:** Snellur uml. kr 17000 fyri hvørja
Renna og avkrøkjari: uml kr 5700 fyri hvørja
Rullur at føra dorgina gjøgnum: 3x800 kr
Roknast kann við at tað kostar kr 25000 fyri hvørja skipan, tvs. hvørja langdorg.

**Fiskaprísur:** Prísurin fyri kg á makreli hjá bátunum, sum dyrgja er minni enn prísurin hjá nótabátunum. Prísurin hjá nótabátunum var (11/9. 97): < 400g: 4 kr, 400-600g: 9 kr, >600g: 14 kr.
Prísurin hjá bátunum, sum dyrgja var (11/9. 97): <400g: 2,50 kr og >400g: 5,75 kr.
Á flakavirkjunum siga teir, at góðskan hjá teimum sum dyrgja, er verri enn tann hjá nótabátunum, tí teir hava ikki nóg góða útgerð at køla við. Sera umráðandi er at fiskurin verður køldur niður á 1° C ella minni beinanvegin hann er fiskaður.
Menninir, sum eru við bátunum siga, at orsøkin er at teir hava ikki somu møguleikar at bjóða veiðuna út sum nótabátarnir, tí nøgdirnar eru ov smáar til at tað loysir seg at sigla langt við henni.
Um góðskuna siga teir, at hon er eins góð sum hjá nótabátunum ella betri. Møguliga er onkur ímillum, sum ikki ger sær nóg góðan ómak við góðskuni og hetta hevur so ringa ávirkan á prísin hjá øllum bátunum.

**Kvotur:** Umleið 400 bátar fiska makrel við dorg í Noregi. Frá Egersund og Sirevåg, sum liggur beint við Egersund, royna uml. 200 bátar. Hvør bátur hevur eina kvotu upp á 85 tons. Teir byrja at fiska 4. august og fiska til kvotan er uppi.
Tó er tað soleiðis, at teir smáu bátarnir undir 21,35 m hava eina samlaða kvotu uppá 20.000 tons. Undantøk viðv. støddini kunnu tó gerast. Henda kvota er til bæði smáar nótabátar og til teir, sum fiska við dorg. 20.000 tons er ikki nokk til at allir kunnu fiska 85 tons, so at tá tann samlaða kvotan er uppfiskað, steðga allir. Fiskimenninir leggja ikki so nógv í hetta, tí teir, sum ikki uppfiska sína kvotu, eru oftast teir smáu bátarnir við einum manni umborð, og teir klára seg sjálvandi við minni.

**Fiskiháttur:** Tað verður dyrgt eftir makrelinum við langdorg. Hvør bátur hevur 2 - 5 dergur úti ísenn. Mest vanligt er at hava 3 - 4 dergur, tó er tað støddin á bátinum, sum avgerð hvussu nógvar dergur báturin kann hava.
Hvør dorg hevur millum 30 og 70 húkar. Teir flestu bátarnir hava tó millum 33 og 50 húkar á hvørjari dorg. Dorgin verður øll drigin inn og lorað út hvørja ferð. Samlaða longdin á dorgini er uml 35 favnar. Longdin millum húkarnar er 30 - 40 cm, tó ikki so nær at sterturin á einum fiski kann raka í høvdið á tí næsta og harvið sláa hann av húkinum. Tað gamla mátið millum húkarnar var frá tumlinum til albogan, men síðan fiskiskapurin bleiv effektivari, er tað vorið styttri millum húkarnar. Tjúgdin á dorgini kann vera nr. 180 ella 200 nylon frammanfyri húkarnar, summir brúka tó vanligan 4 mm bøtingartráð. Millum húkarnar brúka teir nylon nr. 140 til 160, alt eftir hvussu nógvir húkar eru á dorgini.
Vanligar fultautomatiskar snellur verða nýttar. Teir flestu hava elektriskar, men oljutrýst snellur verða eisini brúktar.
Tá makrelurin verður drigin inn, verður hann drigin inn í eina slisku og kemur ímóti einum "kippara" so hann fer av. Hagani verður hann førdur gjøgnum eina rennu ella eitt rør beinleiðis í lastina. Nortið verður ikki við fiskin frá tí hann bítur á húkin til hann er í lastini.
At goyma fiskin við í lastini verður ísvatn nýtt. Ein bátur brúkti 2 tons av ísi til 7 tons av fiski. Ein annar brúkti 4 tons av ísi til 15 tons av fiski, so ein kann siga at teir brúktu umleið 1 tons av ísi til 3,5 tons av makreli. Tað týdningarmesta er tó at fiskurin verður køldur niður á minst 1° C skjótast møguligt og heldur kuldanum har. Onkrir koyra nakað av salti í, men hetta hevur tann vansan, at makrelurin gerst ov ljósur um ov nógv salt verður nýtt.
Sera umráðandi er at hava passaligt av sjógvi í lastini. Fiskurin skal liggja undir, men um ov nógvur sjógvur er í lastini, fer makrelurin at skreiða so at skræðan fer av.
Sjógvur og ísur verður koyrt í lastina áðrenn byrjað verður at fiska. Tá lastin er full, verða o.u. 500 kg av ísi koyrd omaná. Summir koyra eisini nakað av sjógvi í, men ikki allir.
Í lastini eru langskips skott fyri at halda fiskinum í vánaligum veðri, og so sjálvandi fyri stabilitetin.
Sum sagt verður dyrgt eftir makrelinum. Ferðin á bátinum liggur um 1,5 til 2,3 míl, alt eftir streymi og vindi.
Tá byrjað verður at dyrgja, verður dyrgt í ein stóran runding fyri at vita hvønn veg makrelurin tekur, hann tekur nevniliga ikki altíð í allar ættir. Summir siga, at best er at hava sólina onkursvegna í ryggin, t.v.s. vestligar kósir á morni og eystligar á kvøldi.
Á ekkoloddinum skrivar makrelur antin sum ein lind í sjónum, samanhangandi prikkar ella størri reyðir klumpar/prikkar.

**Fiskileið:** Á byrjað við, fyrst í august, er makrelurin langt úr landi, í SW kanti á Norsku Rennu, einar 50 - 70 fjórðingar úr landi. Sum tað líður út, í september mánað, plagar hann at koma nærri landi. Tann smái kemur oftast fyrst.
Tá makrelurin er nærmast, er hann bert einar 4 fjórðingar úr landi.

**Stødd á bátum:** Støddin á bátunum er sera ójøvn. Frá glastrevjabátum, sum eru 26 fót, til 60 tonsarar úr stáli og træ. Nógvir eru tó úr 35 fót glastrevjabátum til 30 tonsarar úr træ.

**Hagreiðing umborð:** Umborð fer makrelurin beinleiðis í lastina á bátinum eftir einari slisku. Í lastini er ísur blandaður við sjógv. Sera umráðandi er at fiskurin verður skjótt køldur niður á minst 1°C. Í lastini eru langskips skottir, soleiðis at fiskurin ikki rósar ov nógv.

**Hagreiðing á landi:** Á landi verður makrelurin haggreiddur til matna. Nógv tann største parturin fer til Japan. Hann verður antin frystur heilur ella skorin til flak. Hetta fevnir um heilt frá smápakkaðum flaki í 2 kg eskjum til heilfrystan makrel í 20 kg eskjum. Á tí eina virkinum vóru 2 menn frá Japan sum eygleiðarir av góðskuni.

**Niðurstøða:** At dyrgja eftir makreli undir Føroyum er nakað sum kundi verið áhugavert at roynt. Útgerðin er ikki so kostnaðarmikil um snellurnar eru tøkar. Einasta stóra broytingin, sum gerast skal umborð, er at fiskurin skal koyrast í ísvatn ístaðin fyri at fiskurin í dag bert verður ísaður. Til hetta kundu, sum ein byrjan, veri nýtt kør við ísvatni, ístaðin fyri at gera alla lastina um.
Tá øll tann fasta útgerðin er fingin til vega, kostar tað sera lítið at dyrgja eftir makreli. Umframt olju eru útreiðslurnar bert ísur og húkar/dergur. Tann eini báturin, sum júst var liðugur við makrelkvotuna, hevði brúkt fyri 3000 kr í húkum og dergrum. Umframt hetta kemur so ísur og olja.
Undir Føroyum er makrelur onkuntíð inni við land um summari og nótabátar plaga at fiska makrel longur til havs um heystið.
Sera áhugavert kundi verið at roynt at dyrgt eftir makreli undir Føroyum komandi ár. Fyrimunurin við hesari veiðu er, at hon krevur ikki nógv fólk umborð á bátunum og kostar ikki nógv at reka.

**Adressur:** Fiskerirettlederen i Egersund, Hå og Sokndal, Jan Erik Jensen
Strandgt. 2
Boks 286
4371 Egersund
Tel: 51 49 03 66
Fax: 51 49 31 52

Rennur, snellur, rullur og onnur føst útgerð: Hovland Båt A/S
Hovland
4370 Egersund
Tel: 51 48 73 88
Fax: 51 48 01 35

**Mynd 1.** Uppseting av rennum og dergrum.



Dergurnar mugu førast ymsar vegir, soleiðis at húkarnir ikki koma upp á snelluna.

Dømi um tilrigging á einum 30 tonsara:
5 automatiskar snellur 5 rennur
5 dergur at fiska við. 3 aftan og 2 longur frammi. Tvørskips avst. minst 2,70m.
50 húkar á teimum aftaru dergrunum og 40 húkar á teimum fremru.
Fremru loddini viga 6 kg og tey aftaru 4,5 kg.
Um makrelurin stendur á 8 - 12 favna dýpi, lora 28 fv út á teimum aftaru dergrunum og 22 fv á teim aftaru (total).